

## B68 spældi tveir dystir

1. deildarliðið hjá B68 spældi tveir venjingardystir um vikuskiftið. Leygardagin var mótstøðuliðið Skála, sum spælir í bestu deildini, og teir úr næstbestu deildini megnaðu javnleik. Einki mál kom í dystinum, sum tó ikki var keðiligur. Sunnudagin spældi B68 ímóti SÍ, sum eisini spælir í 1. deild, og hesaferð komu fleiri mál. B68 vann dystin 4-1. Málini hjá B68 skutu Øssur Hansen, Jósup Henriksen og Kristian A. Andreasen (2). Málið hjá SÍ gjørdi Jan Joensen.

## Denver-spælarar doyggja

Seinastu tveir mánaðirnar eru tveir spælarar hjá Denver Broncos, sum spælir amerikanskan fótbólt, deyðir. Fyri tveimum mánaðum síðani var Darrent Williams skotin og doyði. Og um vikuskiftið doyði tan nbert 24 ára gamli Damien Nash. Hann spældi við í einum kurvabóltsdysti, sum var til vælgerandi endamál, tá ið hann small um og doyði. Deyðsorsøkin er ikki váttað enn.

Neistin-Kyndi 24-20 (11-9):

# Neistin ov sterkt til grannarnar

**Kyndilskvinnur megnaðu ikki av álvara at hótta Neistan sunnudagin**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tær enn hava Stjørnuna framman fyri seg, so staðfestu Neista-kvinnurnar sunnudagin, at tær enn eru best í høvuðsstaðnum.

Móti Kyndli hevði Neistin sjáldan trupulleikar, og tó at liðini fylgdust væl fyri steðgin, so tóktust tær bláu alla tíðina at hava størra yvirskotið.

Hetta gav eisini at bíta fyrstu løtuna eftir steðgin, tá Neistin setti mest sum alt upp á pláss. Fýra mál á rað øktu munin upp í seks mál, og so kundi Kyndil ikki gera stórvegis annað enn at avmarkað tapið. Tann setningurin eydnaðist sum so, men stig fingust ikki úr dystinum, og so er mest sum eingin ivi um, at Kyndil ikki røkkur hálvfinaludystinum móti Stjørnuni.



*Hóast tær her hava væl fatur í Nicoletu, so megnaði Kyndil ikki at steðga grannunum úr Neistanum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FAKTA**

**Neistin-Kyndil 24-20 (11-9)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 11(3), Ása á Neystabø 3, Unn Kragesteen 3, Annika Thomsen 2, Rakul Agustinussen 1, Gunnvá Brockie 1, Tordis Tróndarsson 1, Katja Eigemann 1, Elin Stakssund 1
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 7, Randi Wardum 4, Lina Andriulyte 3, Anja Heinadóttir 3, Bjørg Syderbø 1, Ronja Mikkelsen 1, Brynhild Klein 1
**Brotskøst:** Neistin 4, Kyndil 2
**Útvísingar:** Neistin 1
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

Stjørnan-VB 26-17 (16-12):

# Stjørnan vissaði sær oddasessin

**Kvinnuliðið hjá Stjørnuni vann greitt, tá finalistarnir í steypakappingini í hondbólti hittust aftur í Klaksvík leygardagin**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tær av mest sum púra samdum almenningi verða kosnar sum risa-favorittar, hvørjar ferð tær fara á vøllin, so hevur Stjørnan í fleiri forum sýnt, at tær ikki eru heilt klárar, tá dystir byrja.

Soleiðis var eisini leygardagin, tá VB nýtti fyrstu løtuna av dystinum at leggja seg fram um við nøkrum málum. Eitt time-out frá venjarabeinkinum fekk tó Stjørnuna at rakna við, og so gekk skjótt at fáa heimaáskoðararnar í veitslulag. Innan fimm minuttir var 4-6 broytt til 9-6.

Og so hildu tær á heimaliðnum annars fast. Hóast ferðin eftir steðgin sjáldan kom upp á tað maksimala, so hevði Stjørnan ongan tíð nakrar trupulleikar at halda fast um leiðsluna, sum ongan tíð fór niður um fýra mál eftir steðgin.

Við sigrinum hevur Stjørnan tryggjað sær fremsta plássið í endaspælinum í Sunset-kappingini, hóast ein dystur er eftir at spæla.



*Stjørnan læt ongan iva vera um oddasessin, tá tær leygardagin spældu annan dystin á rað móti VB*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FAKTA**

**Stjørnan-VB 26-17 (16-12)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Una Olsen 6, Simona Petersen 6(2), Joan Midjord Djordjevic 4, Durita Christophersen 2, Anna Kristina Samson 2, Alina Olaru 2, Bára Skaale Klakstein 2, Edith Hansen 1
**VB:** Ivana Ljubicic 8(2), Rannvá Johannesen 3, Maja Sølvsten 3, Margreth Augutinussen 2, Bára K. Mortensen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3, VB 2
**Útvísingar:** Stjørnan 2, VB 4
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

## Broytingar skulu stuðla spælaramenningini

Kappingarnevndin hjá FSF hevur nú gjørt uppskot til reglugerð, sum skal geva yngru spælarunum fleiri dystir

Høvuðssetningurin er at forða fyri, at spælarar verða »læstir« á beinkinum á besta liðnum hjá einum felag.

Í dag er støðan ofta tann, at ungir spælarar sita nógv á beinkinum, tá Formula-bóltur verður spældur sunnudag. Hetta ger, at teir ikki kunnu vera í hópinum, sum spælir við t.d. 1. deild leygardag, og tí verður dystarvenjingin ofta sera avmarkað hjá hesum spælarum.

Nýggja reglan gevur spælarum undir 21 ár loyvi at spæla tveir dystir eitt og sama vikuskifti. Líknandi regla hevur í fleiri ár verið fyri málverjar, sum kunnu spæla leygardag og sita á beinkinum sunnudag.

Í viðmerkingunum, sum formaðurin í Kappingarnevndini hevur sent feløgunum, verður sagt:

»Við hesum uppskoti, fer tað t.d. at bera til hjá leikarum undir 21, at leika dyst leygardag við 1. deildarliðnum, og allíkavæl vera við í hópinum á Formulaliðnum, og sostatt verða við á beinkinum sum eykaleikari sunnudag - og í fall tørvur er á tí, leika við. Sama er galdandi fyri fyri 2. deild. T.d. ber tað til at koma inn sum eykaleikari á Formulaliðið, og leika víðari við 2. deildarliðnum beint eftir Formuladystin.«